## VALGREINAR

# Vinnulív og vinnulívs-politikkur

**Heðin Zachariasen**
*valevni Fólkafloksins í Norðstreymoy*



Vit kunnu øll verða samd um, at best er, tá ið okkara vinnulív klárar seg sjálvt uttan almennan stuðul. Men hóast tað, so er neyðugt, at vit hava politikarar, sum eru tilreiðar at verja um okkara vinnulív og sum síggja álvarsemi í, at neyðugt er at leggja góðar karmar, fyri at okkara vinnulív kann virka væl her á landi.

Vit hava ikki brúk fyri politikarum, sum bert sita og hyggja at og einki tora ella vilja gera, tá ið okkara vinna, eitt nú rækjuflotin verður fyri tí lagnu, sum vit hava verið vitni til í seinastuni og vit hoyra politikarar bert siga, at vit skulu ikki gera nakað sum helst, tí so er talan um stuðul til vinnuna og tað vilja teir ikki verða við til. Nei, tað er ikki ein ábyrdarfullur politikari. Tá er munur á einum politikara, sum sær veruleikan í eyguni og altíð er til dystin fús at taka fatt, hetta fyri at loysa trupulleikarnar, sum uppstanda í tí dagliga degnum.

Føroyar eru eitt lítið samfelag og tó ein partur av eini nógv størri heild. Okkara fiskivinna og alivinnan eru í harðari kapping við vinnur í øðrum londum, bæði nær og fjar. Tí er neyðugt at vit føra ein virknan vinnupolitikk. Politikarar skulu ikki at spæla vinnulívsmenn, men ístaðin taka vinnuna við uppá ráð og laga okkara lógir til umstøðurnar, sum skulu verða so góðar og rúmligar, sum gjørligt. Tá noyðast vit eisini at hyggja eftir, hvussu treytirnar hjá somu vinnum eru í teim londum, sum vit kappast við.

Fólkaflokkurin hevur verið við til at gjørt týðandi broytingar á vinnulívsøkinum, sum hevur verið til gagn fyri alt okkara samfelag. Eitt gott dømi er okkara vælvirkandi fiskidagaskipan. Her vóru menn, sum tordu at taka stór tøk og fingu hesi viðurskifti uppá pláss. Hóast lógin nú óivað treingir til at verða endurskoðað, so er eingin ivi um, at okkara fiskivinnupolitikkur hevur verið við til at bygt okkara land uppaftur.

Tað er umráðandi, at vit til løgtingsvalið 20. januar velja politikarar á ting, sum síggja veruleikan í eyguni og eru tilreiðar at bróta upp ermar og broyta umstøðurnar, um tað gerst neyðugt. Tað er ein uppgáva, sum ein og hvør, sum bjóðar seg fram, eigur at taka á seg. Og tað ger Fólkaflokkurin.

# Tað skal loysa seg

**Jakob Holm**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Vit í Sambandsflokkinum hava við okkara nýskipanaruppskotið, valt eina framtíðarskipan innan Ríkisfelagsskapin. Sambandsflokkurin metir vælferðarsamfelagið og persónliga frælsið hjá tí einstaka meira virðismikið enn nationalistiskar hugsjónir. Fullveldisskútan hevur kollsilgt.

Vit eru komin á eitt vegamót, har tað er umráðandi at vit leggja ein miðvísan politikk fyri komandi árini.

Sambandsflokkurin gongur inn fyri, at fáa fleiri og størri inntøkukeldur til samfelagið. Vit ynskja og vóna at Føroyar eisini komandi árini kunna roknast fyri at vera eitt vælferðarsamfelag, sum gevur vælferð og møguleikar til tann einstaka.

Hetta kann eitt nú gerast við at skapa betri karmar hjá vinnuni. Hettar skapar eisini ein búskaparvøkstur, sum er ein fyritreyt fyri at fáa eina betri vælferð, so sum sjúkrahús, betri skúlar og eina betri eldraforsorg, sum eisini gevur eitt betri umhvørvi.

Tað skal loysa seg, og fólk skulu vera glað fyri at arbeiða. Tað skal løna seg betri at arbeiða meira, og at skatturin av eyka arbeiði verður 40% í staðin fyri núverandi 60%. Eisini skulu fólk hava møguleikan at verða longri á arbeiðsmarknaðinum.

Samfelagið hevur brúk fyri allari tøkari arbeiðsmegi. Eisini teimum sum hava nátt pensionist aldurin, um tey ynskja tað. Tað skal altíð loysa seg fyri ein pensionist at arbeiða, sjálvt um hann fær pensión. Fólk sum ynskja at arbeiða meira, skulu eisini hava meira eftir til egna nýtslu. Fleiri fólk á arbeiðsmarknaðinum, størri verður vælferðin.

Vit hyggja frameftir
X VIÐ LISTA B.
Gott Val

# Sambandsflokkurin segði nei at skerja blokkin - tí tað var ábyrgdarleyst

**Annfinn Brekkstein**
*valevni Sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



At skerja blokkin við 366 mio.kr. var ábyrgdarleyst, og ein panikkavgerð sum als ikki var gjøgnumhugsað, tí grundarlagið fyri minkingini var ikki tilstaðar. Alivinann saman við rækjuflotanum hevur stórar trupuleikar at dragast við, og hesi bakkast fara at síggjast aftur á útflutningstølunum fyri rækjur og laks. Eisini at førir hetta við sær, at inntøkan hjá landinum minkar og arbeiðsláss koma í vanda.

Við at skerja blokkin hevur fullveldissamgongan lagt óneyðugar byrðar á tann Føroyska búskapin, og harvið skapt ótryggleika sum aftur kann hava óneyðugar rembingar sum raka fólkið í landi okkara.

Tá polittikarar taka avgerðir, eiga og skulu avgerðirnar tæna fólkinum og samfelaganum.

Aftur eitt dømi um ráðaloysi, ódugnaskap og ábyrgdarloysi sum hevur verið felagsnevnarin hjá fullveldsissamgonguni.

Vel sambandsflokkin, og tú velur ta tryggu loysnina.

# Útróður ein skynsom vinna!

**Vinjard Johansen**
*Valevnið Miðfloksins í Eysturoy*



Útróður hevur gjøgnum øldir verið ein týðandi táttur fyri okkara samfelag. Menn hava trúðliga róð út við smábátum og borið miklan fong til lands.

Henda vinna er enn lika týdningarmikil og tí er umráðandi at skapa henni góðar karmar.

Góðskan á hesum fiski er vanliga fyrsta floks og tí væntast eisini góður prísur.

Uppboðssølan hevur hjálpt munandi um at fáa prísin upp, men týdningarmikið er at tað ikki steðgar her. Tað má arbeiðast víðari. Eitt sum ræður um tá hugsa verður um hægri prísir er at flutningsviðurskiftini gerast betri, so fiskurin kann fara út um alt Evropa, so feskur sum tilber. Tað er á teimum fesku maknaðinum, at okkara útróðarfiskur fær best prís.

Miðflokkurin og undirritaði vilja tryggja framhaldandi trygg kor fyri útróðurin, so hann fær frítt at fiska og harumframt kann seljast so dýrt sum tilber

Útróður hevur stórum týdning úti á okkara bygdum runt um, og tað má hann framhaldandi verða, um lív skal verða laga úti um í Føroyum.

# Samábyrgd

**Petur Egholm Poulsen**
*valevni Miðfloksins í Sandoy*



Heilt frá byrjanini av hevur tann kristna hugsjónin staðið sentralt hjá Miðflokkinum. Tann kristna hugsjónin í politikki má vera at seta ein høgan etiskan og moralskan standard, tó ikki sum eitt krav. Tí tvingsul førir onga leið.

Næstakærleiki er eitt lyklaorð, tá íð tað kemur til moralskar og etiskar spurningar. Í hesum sambandi kan ein og hvør læra av søguni um samverjan, sum ikki hugsaði um sín egna tryggleika. Miðflokkurin vil framvegis arbeiða fyri at sjuk, gomul og brekað fáa trygg og góð livikor. Og fyri okkum, sum hvørki eru sjúk, gomul ella brekað, er tað allneyðugt, at vit hugsa tvørtur í móti tíðarandanum. Tvørtur ímóti einari einsporaðari hugsjón um at fáa nøkta mín matrialistiskan tørv.

Heimið er grundasteinurin í samfelagnum, og tað er fyrst og fremst har socialiseringin av einum barni fer fram. Soleiðis var tað í stórfamiljunum fyrr og soleiðis eigur tað at vera í kjarnufamiljunum í framtíðini. Socialiseringin í einum heimi er avbera umráðandi, tí tað er har eitt barn finnur sín samleika, tað er har grundalagið fyri hvussu væl tey skullu eydnast seinri liggur. Hetta grundalagið er avgerandi fyri hvussu tey klára lívið, tá íð tað fer harðliga við einum. Ì sundurknústum familjum hava vit fingið børn við sundurknústum sálum. Hesi eru og vera vaksin ein dag. Í børnunum liggja, arbeiðismøguleikar, hugskotini, ja øll framtíðin. Tí vil Miðflokkurin arbeiða fyri, at lóggávan er hjúnabandsvinarlig og verjir heimið.

Her kundi bara nevnast nøkur fá ting, um hví tað er skilagott at stuðla Miðflokkin. Eg vil heita á øll, sum ynskja at varveita tann krisna siðararvin við einum høgum, etiskun og moralskum standard í Føroyum, serliga til tað trúgvandi fólkið. Vís samábyrgd/solidaritet og lat tína samkenslu røkka yvir alt landið, vel Miðflokkin!

**VARPIÐ**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**
**Skráir og ummælir**
**Hvønn fríggjadag**
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

# í Býin

felagið TÓRSHØLL
í vikuskiftinum spælir
**TARTA**
Leygarkvøldið 10. januar kl. 20.00 - Bingo
Ókeypis atgongd í kjallaranum fríggjakvøld og leygarkvøld



TAKE OFF
LIVE Á PLATFORM
LEYGARKVØLDIÐ 10. JANUAR
EISINI VERÐUR DISKOTEK
PLATFORM





BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

**NÁTT-BUSSURIN**
**hjá Øssuri Christiansen**

*Koyrt verður leygarkvøld:*

**Vágaleiðin** *(tlf. 217753)*
• Úr Vágunum — *bert eftir avtalu*
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30

**Vestmannaleiðin** *(tlf. 217752)*
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

club KAGGIN
Hóskvøldið spæla
All That Rain
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið spæla
ALL THAT RAIN
Serligt tilboð í barrini kl. 23.00 – 00.30
Leygarkvøldið spæla
ALL THAT RAIN
Serligt tilboð í barrini kl. 23.00 – 00.30
www.kaggin.fo

Klaksvíkar Klubbi Tel 455681



**Fríggjakvøldið**
Kl. 17 Fimmari
**Leygarkvøldið** (opið frá kl. 22)
Kl. 24 Dansur
Við Njál og Mourits
**Sunnudagin**
Kl. 15 Sjavskapping

**Mat-seðilin**

Hósdagin 8. jan:
**Roykt medistarpylsa & Høsnarungi**

Fríggjadagin 9. jan:
**Ræst kjøt**

Leygardagin 10. jan:
**Lambasteik**

Mánadagin 12. jan:
**Hamburgarryggur & Gjørd hara**

Týsdagin 13. jan:
**Fiskafrikadellir & Revelsbein**

Mikudagin 14. jan:
**Hakkibúffur & Saltkjøt**

***

**Seinnaparts-TILBOÐ**
frá kl. 14.00:

**Juniorburgari 22,00**
**Maxiburgari** *ella*
**Búffsandwich 30,00**

**Matstovan í Hoyvík**









Manhattan
PUB & CAFE
Livandi tónleikur
Hóskvøldið og fríggjakvøldið:
Sámal Ravnsfjall
og Ronnie Nielsen
Leygarkvøldið:
Eyðun & Jónas
Manhattan
PUB & CAFE
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

AUTO
-Dag & nátt-
Vilt tú bil hýra
- ring 311234
-Alt døgnið-
Nú fáast eisini
Talutíðarkkort
Føroya Tele
Kall
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

